## Líka spyrjandi sum danir

Føroyskir menn lata sær ikki meira lynda enn danir. Hetta heldur í øllum førum yvirlæknin, Jóhan Poulsen, sum vanliga kannar og viðger danskar menn í norður Jyllandi, men sum eisini arbeiðir í Føroyum nakrar ferðir um árið. - Tað er yvirraskandi, at føroysku menninir eru akkurát líka ansnir og ágrýtnir sum danskir menn. Teir vilja hava skjóta og málsøkna viðgerð og finna seg ikki bara í støðuni, sigur Jóhan Poulsen. Og føroysku menninir spyrja heldur ikki minni enn danir. Teir vilja vita, hvat teimum feilar, hvat kann gerast fyri at fáa leking, og hvørja ávirkan viðgerðin hevur. - Eg ynski altíð, at konan er við til fyrstu samrøðuna, tí tá ið ein sjúklingur fær at vita, at hann hevur krabbamein, hoyrir hann ikki meira enn tey fyrstu 10 sekundini. Men føroysk pør eru líka opin sum donsk, og sjálvandi ynskja tey ta bestu og mildastu viðgerðina.

# prostata



oyum, skulu íløgur gerast í nøkur ikki so heilt kostnaðarmikil tól.

Men grundleggjandi kunning er eisini ein stórur partur av stríðnum móti prostatakrabba. Menn mugu kenna vandan fyri at fáa krabbamein í bløruhálskertilin, so teir søkja sær skjóta hjálp.

### FAKTA: Prostata

Prostata – ella á føroyskum bløruhálskertilin – hevur form og stødd sum ein kastanjunøt, tað vil siga, at hann er á leið tveir sentimetrar í diametri. Bløruhálskertilin situr beint undir urinbløruni, og urinrørið fer í gjøgnum kertilin. Vanligur prostata vigar 25 gram og eru settur saman av smáum kertlum, sum framleiða meginpartin av sáðveskuni, sum verða goymdar í sáðblørunum.
Flestu gøgn eru soleiðis innrættað, at tey minka við aldrinum, men prostata hevur lindið til at vaksa. Góðkynjaður vøkstur av prostata er ikki krabbamein, men kann geva trupulleikar við vatninum. Vøksturin byrjar ofta um 50 ára aldur og kann viðgerast við medisin ella skurðviðgerð.
Krabbameinslíknandi kyknubroytingar kunnu síggjast hjá meira enn 30 prosent av øllum monnum yvir 50 og hjá heili 80 prosent av monnum yvir 80 ár. Um talan er um krabbamein, verða ymiskar viðgerðir bjóðaðar alt eftir um krabbameinið hevur spjatt seg og hvussu gamal sjúklingurin er.
Meira kunning um prostatakrabbamein er at finna á heimasíðunum hjá Føroya Felag Móti Krabbameini (www.krabbamein.fo) og danska felagnum Kræftens Bekæmpelse (www.cancer.dk). Eisini er eitt danskt felag fyri prostata sjúklingar, PROPA, sum hevur útgivið bæði bóklingar og kunnandi filmar.

# Svend Auken hevur prostata krabbamein



*Danska Ekstrablaðið rósar í oddagrein Svend Auken fyri at vera so opin um prostatakrabbameini, ikki minst tí hann kann vera fyrimynd fyri aðrar menn, sum hava torført at tosa um sjúkuna*
*Mynd: Polfoto*

**Fyrrverandi leiðarin í danska javnaðarflokkinum, Svend Auken, er álvarsliga sjúkur av krabbameini í prostata. Hann hevur valt at staðið alment fram við sjúkuni, tí hann nú skal í kemoviðgerð**

HEILSA
*Dorit Hansen*

65 ára gamli, Svend Auken, fólkatingsmaður hjá danska Javnaðarflokkinum og limur í formansskapinum í Fólkatinginum, fekk fyrstu ferð staðfest prostatakrabbamein í 2004. Hann fór í viðgerð, og alt sá út til at ganga væl.

Men í 2007 kom sjúkan aftur. Og seinasta vikuskifti valdi fyrrverandi formaðurin fyri danska javnaðarflokkin, sum er tiltikin varin um privat viðurskifti, at standa alment fram og greiða frá um sjúkuna. Orsøkin er millum annað, at hann nú skal í kemoviðgerð, sum væntandi fer at merkja útsjónd hansara.

### Deyðin nærkast

- Tíbetur eru fleiri viðgerðarmøguleikar, og nýggir viðgerðarhættir eru á veg. Men eg veit væl, at eg møguliga eri farin inn í seinastu tilgongdina, sum tó kann varða fleiri ár, skrivar Svend Auken í opnum brævi í danska blaðnum, Politiken.

Hann leggur dent á, at hann ynskir at halda á fram í arbeiðnum í formansskapinum í danska fólkatinginum.

- Um tað er møguligt, hevur tað týdning at varðveita gerandisdagin í so stóran mun sum møguligt. At passa sítt starv, um tað letur seg gera. Eg ynski at halda fram í Fólkatinginum, so leingi eg orki og so leingi norðurjysku veljarnir ynskja meg har, staðfestir danski politikarin.

### Sjúku solidaritetur

Svend Auken sigur, at hann hevur valt at vera opin um sjúkuna, bæði tí hann ynskir at sleppa undan spekulationum og leysasøgum og í solidariteti við hini, sum líða av somu sjúku.

- Vit eru mong, sum hava eina álvarsliga krabbameinssjúku – og tíbetur gongur tað væl hjá mongum. Tí er ongin orsøk til at goyma seg, sigur danski fólkatingslimurin.

Svend Auken greiðir í brævinum frá, hvussu tað var, tá ið urologurin ringdi til hann á kontórinum í Christiansborg við tungu boðunum, at hann aftur hevði fingið krabbamein.

Hann hugleiðir harumframt um fólk, sum hann hevur mist til krabbamein. Fólk, sum hava staðið honum nær sum vinir ella starvsfelagar. Og so tosar hann um sín nýggja fylgisvein, deyðan, og hvussu deyðin gevur lívinum eyka virði.

### Vakt ans

Opnað og erliga brævið hjá Svend Auken hevur vakt ans í fjølmiðlunum og politiska umhvørvinum í Danmark. Aðrir politikarar hava róst honum fyri opinleikan og givið honum eggjan og stuðul, og allir danskir miðlar hava loftað søguni.

Danska Ekrablaðið hevði millum annað eina oddagrein, har teir rósa javnaðartingmanninum fyri at tosa opið um eina sjúku, sum ikki so nógv orka at tosa um. Serliga týdningarmikið er tað, sigur blaðið, at Svend Auken sum maður tosar erliga um krabbamein, tí menn hava ofta torført at tosa um so álvarasligar sjúkur.